## Krabbagágga í egnum landi:

*Myndir: Høgni Heinesen*

# Náttarlív á Tvøroyri?



*Krabbagággurutan:*




### Lonely Planet um Tvøroyri

Hóast Tvøroyri hevur hægsta íbúgvaratal í Suðuroynni, er hendan yvirvaksna bygdin lítið áhugaverd sum annað enn eitt millumlið millum norðaru og sunnaru helvt av oynni. Um tú gongur oman og niðan høvuðsgøtuna og leitar eftir onkrum at gera til næsti bussur kemur, kann eg ikki mæla til annað enn ein gongutúr á keiini. Um tað ikki riggar, so les eina góða bók ella forkela teg við einari máltíð á hotellinum (um tað er opið).

*Okkara party-guide á dansigólvinum*




*Suðuroyingar í TB-húsinum*



*Kjallarin undir Hotel Tvøroyri*

***Krabbagággan skrivar:***

- Verðinsmenn her?

Móttøkan vit báðir myndamaðurin fáa í ølstovuni undir Hotel Tvøroyri er heldur skeptisk. Teir fýra, sum her eru inni, hava allir sitið um sama borð og prátað harðmælt. Men prátið tagnar heilt, tá vit koma inn.

*Vit eru ikki verðinsmenn. Vit eru havnarmenn.*

- Hvat skulu tigor her?

*Drekka eina øl, um tað ber til.*

Tøgnin er larmandi.

Teir fýra hyggja tigandi uppá hvønn annan og avgera so eftir øllum at døma, at vit eru góðir nokk.

- Jamen so komið og setið tykkum niður, sigur ein teirra og setir seg longur inn á bonkin, so pláss verður fyri báðum "verðinsmonnunum".

So byrjar prátið aftur. Menn eru blíðir og týðir, og eftir stuttari løtu er sjálvt seinasta sindrið av skepsis ruddað av borðinum.

Eg eri farin út eitt leygarkvøld í størsta býnum í Suðuroynni at uppliva Føroyar sum ferðamaður - eftir at sólin er sett.

- Nú er síðsti kjansur, rópar barrvørðurin. Vit stongja klokkan ellivu.

Teir fýra brúka síðsta kjansin, vit báðir myndamaðurin tøma okkara øl og fara út á gøtuna aftur.

So var tað opinbart ikki her, vit skuldu finna náttarlívið á Tvøroyri.

Klokkan er ellivu og her er líka steindeytt sum á fulla mánanum uppiyvir okkum. Í so máta er Tvøroyri onki øðrvísi enn restin av hesum landinum, her gøturnar ofta eru stillari klokkan ellivu leygarkvøld enn í kirkjutíð. Best man vera at fara heim aftur at bíða til eftir midnátt.

Tveir tímar seinni standa vit aftur á gøtuni á Tvøroyri. Her er líka manntómt sum fyrr, men nú koyra væl fleiri bilar. Uttan at vita nágreiniliga hvar nakað náttarlív er, rætti eg tummilin út í vón um, at onkur skal sama veg.

Tíggju minuttir seinni standa vit framvegis sama stað. Vit hava enn ikki møtt einari sál, sum kann siga nakað um hvar náttarlívið á Tvøroyri gongur fyri seg í kvøld, og eingin bilur er steðgaður, so nú má ein av neyðsynjarhættunum nýtast. Eg ringi eftir einum taxa.

*Vit skulu hartil, sum náttarlívið á Tvøroyri er*, sigi eg við røddina í rørinum.

- Dansur er í Vági í kvøld, so her hendir ikki so nógv.

*Jamen er so onki her?*

- Tað er diskotek í TB-húsinum.

*Kanst tú so koyra okkum til TB-húsið? Vit standa uttan fyri Telebúðina.*

- So er tað nógv lættari hjá tær at ganga! Far niðan ímóti kirkjuni og halt so bara fram at ganga beint eftir nøsini.

Nógv havi eg upplivað á ferðum ymsastaðni í heiminum, men ein taxasjaførur, sum ræður fólki til at ganga - tað er nakað nýtt. Gott nýtt fyri eina krabbagággu við klønum pengapungi.

Á vegnum niðan fer tummilin út aftur, og mín sann um ikki ein bilur steðgar. Glaðir fara vit inn, og so avstað.

Nú rennur mær í hug tað, sum ferðahandbókin Lonely Planet sigur um at tumla í Føroyum: "beware of drunken drivers". Ungi maðurin, ið situr við róðrinum í hondini, men annars hyggur beint aftureftir ímóti okkum, er dýrandi fullur og koyrir sum eitt svakt.

- Eg havi stolið bilin, sigur førarin fegin á málinum.

Tað vísir seg tíbetur, at bilurin er hansara egni - hann hevur bara stolið hann frá "privatsjaførinum" hjá sær hetta kvøldið.

Stutt er til TB-húsið - serliga tá man koyrir skjótt - og vit koma heilskapaðir fram. Harða uppbremsingin gongur út yvir tey fýra dekkini. Fýra vinfólk hjá bilføraranum náa akkurát at flyta seg, áðrenn uppbremsingin eisini gongur út yvir tey.

*Hvat f... hugsar tú fyri tær? fái eg stamað fram.*

*Og hvar er politiið?*

- Teir koyra runt onkrastaðni her, men teir gera ongum nakað.

Bilførarin er komin væl og virðiliga úr bilinum aftur. Hann fær nakrar vælmeintar átalur frá vinfólkunum, og styrkir seg við einum munni av onkrum úr fløskuni. Vit fáa eisini ein tiltrongdan styrk burturav.

*Takk fyri túrin. Tú vart tann einasti, sum tímdi at taka okkum uppí.*

- Einki problem! Sig endiliga til, um tit skulu koyrast onkrastaðni aftur.

*Jú takk, tað fer nokk ikki at vera neyðugt.*

- Har er politiið, sigur bilførarin og peikar á sivilan løgreglubil, ið kemur koyrandi framvið TB-húsinum.

So teir eru altso úti í kvøld.

Afturímóti at lata heili 80 krónur í part við billetlúkuna sleppa vit inn í eitt meira enn hálvtómt TB-hús, har ein tómur DJ-pultur stendur og spælir tónleik av sær sjálvum. Í barrini verður selt veðraøl úr einum ølkassa á gólvinum.

- Nú. Hvussu følist tað at vera yngst her inni? spyr unga gentan aftan fyri diskin syngjandi sarkastisk, tá eg biði um tvær øl.

Er tað veruliga so týðuligt hugsi eg eitt sindur illa við, og lati eyguni fara ein túr ígjøgnum rúmið.

Ja, er niðurstøðan, tá tað mesta eg síggi eru 15 ára gamlar gentur í evarska smáum ternutum niðurdeilum og smádreingir, ið ganga mær til armholuna.

Bilførarin, sum koyrdi okkum, vísir seg vera ein sera fyrikomandi maður. Sum fleiri av hinum lokalu, vit hava møtt her í oynni, er hann sera gestablíður og til reiðar at gera næstan alt fyri, at vit skulu hava tað gott. Hetta kvøldið gerst hann okkara party-guide út í náttarlívið á Tvøroyri, og hóast ytru umstøðurnar ikki eru av teimum bestu júst hetta kvøldið, fær hann bjargað støðuni, og vit fáa eitt útmerkað kvøld.

Einki er óført hjá honum. Eg sigi meg hava hoyrt, at dansigólvið inni í TB-húsinum eigur at blunka sum eitt livandi talvborð, og áðrenn eg veit av hevur hann funnið tann burturstadda DJ'in fram og kommanderað hann at tendra ljósini í gólvinum.

Tað ber tó tíverri ikki til. Ljósini í gólvinum sigast ikki at rigga longur.

Tá klokkan er farin um tey trý rigga vit heldur ikki longur, biðja fryntliga fulla bilføraranum farvæl, og ganga út í ta ljósu náttina oman í nýggja gistingarhúsið Undir Heygnum, har ein góð song bíðar.

- Kom aftur eitt kvøld tá tað er dansur her. Tá er lív - annars er tað steindeytt, eru seinastu orðini eg fái við frá okkara party-guide.




# HALDIÐ SOSIALIN

**450,-** um ársfjórðingin
- sparið **395,-**
í mun til leysasølu




Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

